# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Kittan í Toftum

**23. juni 1924 – 9. mai 2009**

**- in memoriam**



*Nú sorg er í túni,*
*nú Kittan er farin,*
*oss vitbrandur búni*
*við grøði í garði.*

----

*Tú vart oss ein viti,*
*ein varði í minni,*
*sum fargaði lívið við góðskunnar liti,*
*við hugna í heimi og stovuni inni.*

*Tú møtti oss altíð við orðinum blíða,*
*tú greiddi oss søgu um eitt og um alt,*
*tú tolin í sinni við mótgang sást stríða,*
*tá onkuntíð ógævu grimu tað galt.*

---

*Tó mest er tað hugnan í Toftum vit minnast,*
*tá blíðskapur borin í fang okkum varð*
*og frásøgn, sum bert hjá tí vitra man finnast,*
*vit minnast, at Kittan so vís okkum bar.*

---

*Tú tráddi tær leiðir, sum ættfólk tey gingu,*
*sum aldu upp komandi ættarlið,*
*frá teimum og tær okkar søgu vit fingu,*
*til sjálv tú nú fórst í hin æviga frið.*

*Vit minnast og sakna teg somu stund,*
*nú deyðin við teg gjørdi sátt,*
*nú hvílu tú fanst tær á Himinsins grund,*
*sov søtt og so blítt og so gott.*

**pmp**

**Dagurin**
**13. mai, Ingenuus**. Rómverskur kristin hermaður, sum keisarin Decius læt drepa.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# Læraraskúlanæmingar sum fimleikarar



Mynd frá ”Realskúlaframsýningini 1916-66”, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Her er eitt fimleikalið, har tey flestu eru læraraskúlanæmingar, sum fingu prógv í 1929.

**Aftara rað f.v.:** Jákup Heinesen úr Mykinesi, Jákup við Á (Follend) úr Vestmanna, Jákup Heinesen úr Kunoy, og Leifur Tróndarson úr Skálavík.

**Miðraðið f.v.:** Olaf Krossteig úr Leirvík, Niklái Petersen av Kirkju, Hans David Petersen úr Vági, Napoleon Petersen úr Sørvági, Hans Mikal Jacobsen av Kirkju, Svend Poulsen (á Grundini), Johan Olsen úr Havn, og Andreas Andreassen úr Vestmanna.

**Fremst f.v.:** Sanna (kona Svend á Grundini), Anna Dalsgarð (Petersen) av Velbastað, Eisabeth Kamban (Andreassen) úr Havn, Helga Christiansen (Øregaard) úr Kvívík, og Johanna Z. Djurhuus (Jacobsen) úr Fuglafirði..

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja til myndina ella hevur hug at ogna sær hana, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 259).

*Myndaeigari: Fornminnissavnið*

## Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum mongu, sum gleddu meg á 90 ára føðingardegnum.

Harrin signi tykkum øll.

**Heilsan**
**Andrias Nielsen, Sandavágur**

## Rætting

Í minningarorðunum um Miu Gaard í Oyndarfirði í leygardagsblaðnum kom av misgávum at standa Jákup Lützen, keypmaður. Rætta eftirnavnið er Jákup Olsen, og Lützen kom seinni at handla í Víkum.

**Heilsan**
**Jústinus Leivsson Eidesgaard**


Lesið Sosialin so eru tit við